NORÐOYA SPARIKASSI

# Roknskapur 1. hálvár 2003

# Rakstrarroknskapur 1. hálvár 2003

| Viðm. | | 2003 1.000 DKK | 2002 1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 35.806 | 35.939 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 8.851 | 10.451 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **26.955** | **25.488** |
| | | | |
| | Vinningsbýti av partabrøvum | 44 | 44 |
| | Kostnaður og provisjónsinntøkur | 1.459 | 1.194 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisjón | 58 | 37 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **28.400** | **26.689** |
| | | | |
| 3 | Virðisjavnan av lánsbrøvum og útlendskum gjaldoyra | 3 | 793 |
| | Aðrar vanligar inntøkur | 217 | 467 |
| 4 | Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 14.931 | 12.900 |
| | Avskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | 463 | 526 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 323 | 204 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 248 | 2.121 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **12.655** | **12.198** |
| | | | |
| | Skattur | 2.529 | 2.474 |
| | | | |
| | **Hálvársúrslit** | **10.126** | **9.724** |

# Fíggjarstøða hin 30. juni 2003

| Viðm. | | 2003 1.000 DKK | 2002 1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | Kassapeningur og innistandandi í tjóðbankanum | 10.732 | 23.330 |
| | Ogn hjá fíggjarstovnum | 58.967 | 39.676 |
| | Útlán | 839.776 | 735.465 |
| | Lánsbrøv | 213.253 | 239.369 |
| | Partabrøv | 729 | 5.571 |
| | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 14.650 | 0 |
| | Ítøkiligar ognir | 8.763 | 10.656 |
| | Onnur ogn | 3.731 | 5.738 |
| | **Ogn tilsamans** | **1.150.601** | **1.059.805** |
| | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | Skuld til fíggjarstovnar | 0 | 0 |
| | Innlán | 900.648 | 831.518 |
| | Onnur skuld | 11.900 | 12.817 |
| | Avsetingar til útreiðslur | 3.023 | 2.832 |
| | **Skuld tilsamans** | **915.571** | **847.167** |
| | | | |
| | Eginpeningur | 224.904 | 202.914 |
| | Hálvársúrslit eftir skatt | 10.126 | 9.724 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **235.030** | **212.638** |
| | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **1.150.601** | **1.059.805** |
| | | | |
| | **Tøl, ið ikki eru tikin við í fíggjarstøðuna** | | |
| 5 | Ábyrgdir og aðrar skyldur | 81.076 | 27.413 |

# Viðmerkingar

| Viðm. | | 2003<br>1.000 DKK | 2002<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Renta av innistandandi í peningastovnum | 1.024 | 1.186 |
| | Renta av útlánum | 29.376 | 28.345 |
| | Renta av lánsbrøvum | 5.406 | 6.408 |
| | Rentuinntøkur tilsamans | **35.806** | **35.939** |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Renta til peningastovnar | 0 | 0 |
| | Renta til innlán | 8.796 | 10.398 |
| | Renta til ábyrgdarapening | 55 | 53 |
| | Rentuútreiðslur tilsamans | **8.851** | **10.451** |
| 3 | **Virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra** | | |
| | Virðisjavnan av lánsbrøvum | 34 | 818 |
| | Virðisjavnan av partabrøvum | 0 | 0 |
| | Virðisjavnan av gjaldoyra | -31 | -25 |
| | Virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra tilsamans | **3** | **793** |
| 4 | **Útreiðslur til starvsfólk og umsiting** | | |
| | Lønir og samsýning til umsjónarráð og stjórn | 695 | 471 |
| | Starvsfólkalønir | 4.668 | 4.510 |
| | Eftirløn til starvsfólk og løn til eftirlønt starvsfólk | 810 | 640 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 369 | 389 |
| | Útreiðslur til starvsfólk tilsamans | **6.542** | **6.010** |
| | Aðrar umsitingarútreiðslur | 8.389 | 6.890 |
| | Útreiðslur til starvsfólk og umsiting tilsamans | **14.931** | **12.900** |
| 5 | **Ábyrgdir og aðrar skyldur** | | |
| | Aðrar ábyrgdir | 77.421 | 21.648 |
| | Kredittilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 3.655 | 5.765 |
| | | **81.076** | **27.413** |

# Lyklatøl 1. hálvár

| Viðm. | 2003 | 2002 | 2001 | 2000 | 1999 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 27,2 | 30,1 | 31,8 | 31,1 | 30,4 |
| Kjarnukapitalprosent | 27,2 | 30,1 | 31,8 | 31,1 | 30,4 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 5,5 | 5,9 | 6,0 | 2,3 | 1,6 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 4,4 | 4,7 | 4,8 | 1,9 | 1,2 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,79 | 1,77 | 1,71 | 1,24 | 1,17 |
| Rentuváði | 2,7 | 2,5 | 3,0 | 4,3 | 5,9 |
| Gjaldoyrastøða | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 96,2 | 92,0 | 82,7 | 92,4 | 86,9 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 184,7 | 248,0 | 304,0 | 196,0 | 250,2 |
| Stórir kundar tilsamans | 51,2 | 27,5 | 21,5 | 28,6 | 0,0 |
| Burturleggingarprosent | 2,9 | 3,9 | 4,1 | 4,2 | 5,7 |
| Hálvárstaps- og burturleggingarprosent | 0,0 | 0,3 | 0,5 | 0,4 | 0,4 |
| Hálvársútlánsvøkstur í árinum | 5,8 | 5,6 | 0,3 | 1,1 | 7,2 |
| Útlán i mun til eginpening | 3,6 | 3,5 | 3,3 | 3,7 | 3,6 |

## Roknskapur 1. hálvár 2003 hjá Norðoya Sparikassa

Norðoya Sparikassi hevði eitt úrslit áðrenn skatt fyrra hálvár 2003 uppá 12,7 mió.kr. Hetta er 0,5 mió.kr. betri enn fyrra hálvár 2002, tá úrslitið var 12,2 mió.kr. Sparikassin fegnast um hetta úrslit, serliga tá havt verður í huga, at rentustøðið er lækkað munandi, og hevur havt við sær, at rentumunin er minkaður millum inn- og útlán.

**Inntøkur**
Netto rentuinntøkurnar hjá sparikassanum fyrra hálvár vóru 27 mió.kr. móti 25,5 mió.kr. sama tíðarskeið í 2002. Hetta er ein vøkstur uppá 1,5 mió.kr. ella knappliga 6 %.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar eru somuleiðis øktar úr 26,7 mió.kr. í 2002 upp í 28,4 mió.kr. fyrra hálvár 2003. Hetta svarar til ein vøkstur uppá góð 6 %.

Sparikassin hevur í ár javnað rentu- og kostnaðarstøðið, og ger hetta, at vøksturin í netto rentu- og kostnaðarinntøkunum ikki er eins stórur sum vøksturin í fíggjarstøðuni.

**Útreiðslur**
Útreiðslur til starvsfólk og umsiting vóru 14,9 mió.kr. móti 12,9 mió.kr. fyrra hálvár í fjør. Hetta er ein vøkstur uppá 2 mió.kr. ella útvið 16 %. Sparikassin væntar tó, at útreiðslurnar, tá árið er lokið, ikki verða hægri enn tær vóru alt árið 2002.

**Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar**
Avskrivingar og burturleggingar móti tapi av útlánum og ábyrgdum vóru 0,2 mió.kr. móti 2,1 mió.kr. í 2002.

**Fíggjarstøða**
Fíggjarstøða sparikassans javnvigar nú við 1.151 mió.kr. móti 1.060 mió.kr. seinasta ár. Hetta er ein vøkstur uppá knappliga 9 %. Innlánið er nú 901 mió.kr., sum svarar til ein vøkstur uppá stívliga 8 %, meðan útlánið er 840 mió.kr., sum svarar til ein vøkstur uppá 14 %.

Eginpeningur sparikassans er nú góðar 235 mió.kr., og er hann hetta seinasta árið øktur við 22,4 mió.kr., sum svarar til 10,5 %. Eginognin er nú 20,4 % av samlaðu fíggjarstøðuni, móti 20,1 % í 2002.

**Gjaldføri og solvensur**
Gjaldføri sparikassans er gott, tað er nú 283 mió.kr. móti 302 mió.kr. í 2002. Broytingin stavar frá, at útlánið hetta seinasta árið er vaksið heldur skjótari enn innlánið. Vøksturin í útláninum ávirkar eisini solvensin, sum fellur úr 30,1 % í 2002 til 27,2 % fyrra hálvár 2003.

**Útlit seinna hálvár**
Sparikassin fegnast um gongdina fyrra hálvár, og væntar at úrslitið seinna hálvár verður áleið tað sama.